# Yvirlitstroling – djupt

**Jákup Sverri, túrur nr. 2242**

**Tíðarskeið: 15/9-24/9 2022**

**Ábyrgd:** Lise H. Ofstad




**Endamál:** *Høvuðsendamálið við túrinum er at kanna botnfisk á djúpum leiðum. Hetta er ein yvirlitstroling fyri djúpvatnsfisk í føroyskum sjógvi. Áherðsla verður løgd á at kanna m.a. gulllaks, blálongu, brosmu, stinglaks, langasporl, trantkongafisk og svartkalva. Hitin við botn varð eisini skrásettur.*


### Samandráttur

Á túrinum vóru skrásett 124 ymisk sløg, harav 88 fiskasløg, á tilsamans 62 góðkendum trolstøðum. Samanborið við í 2020, vísa fyribils úrslit at nøgdin (kg/t) av brosmu er umleið tann sama, nøgdin av gulllaksi, stinglaksi og svartkalva nakað størri, og nøgdin av blálongu, trantkongafiski og kubbutum langasporli nakað minni. Tilsamans blivu 1262 nytrur tiknar og 332 magar kannaðir, umframt 217 gonadu vektir, 220 kruvdar vektir og 121 livur vektir skrásettar.

Magakanningar vístu, at gulllaksur hevði etið millum annað hvalspýggj, krill og krabbadjór, blálonga mest svartkjaft og onnur fiskasløg, stinglaksur høgguslokk, fisk og rækjur, trantkongafiskur krabbadjór og høgguslokk, og at svartkalvi hevði etið svartkjaft, agnhøgguslokk og ymisk onnur fiskasløg.

Eins og undanfarin ár so varð gýtandi gulllaksur fingin. Haraftrat vóru gýtandi búksvarti hávur, svarthávur og havmús fingin. Nøkur sjáldsom fiskasløg vóru eisini fingin, eitt nú ennifiskur, glæmufiskur, pílfiskur, Jensens hávur og Vahls úlvfiskur.




*Mynd 1. Ennifiskur (*Platyberynx opalescens*). Støð 22420034, longd: 11,9 cm, vekt: 70 g.*



*Mynd 2. Glæmufiskur (*Polymetme corythaeola*). Støð 22420038, longd: 18,5 cm, vekt: 23 g.*



*Mynd 3. Pílfiskur (*Melanonus zugmayeri*). Støð 22420011, longd: 20,4 cm, vekt: 45 g.*



*Mynd 4. Jensens hávur (*Galeus murinus*). Støð 22420028, longd: 50,0 cm, vekt: 470 g.*



*Mynd 5. Vahls úlvfiskur (*Lycodes vahli/ Lycodes gracilis*). Støð 22420056, longd: 20,1 cm, vekt: 34 g.*

## Um túrin

Vit fóru av Havnini hósdagin 15/9 kl. 18. Vit byrjaðu at taka støðir norður av Føroya Banka, og tóku síðan støðir kring bankarnar, við Wyville Thomson ryggin og vestan fyri Munkagrunnin, áðrenn farið var inn at landa mikudagin 21/9. Síðan vóru støðir tiknar vestanfyri, við Íslandsryggin og nakrar støðir norðanfyri, áðrenn vit brutu túrin av vegna ringt veður. Vóru á Havnini leygarkvøldið 24/9 kl 21.30; sí kanningarleiðina á kortinum omanfyri.

## Prøvatøka

Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Búningarstigini til botnfisk (búning 1-7, talva 4.4.1 í Sýnishondbókini) vóru brúkt fyri øll fiskasløg, undantikið gulllaks (búning 1-7, egin), kongafisk (búning 1-4, talva 4.4.3), langasporl (búning 1-4, talva 4.4.5), havtasku (búning 1-5, egin) og stinglaks (búning 1-5, egin).

## Reiðskapur

Stjørnutrol við 40 mm meskum í posanum. Rockhopper grunnur (24-24in), Seahunter Vágslemmar (6.5m$^2$; 2.250kg). 120 m breitlar. Starmon-Oddi temperatur- og dýbdarmátari festur á høvðuslínuni.

## Viðmerkingar

Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í imp-útskriftirnar.

## Fólk við frá Havstovuni

Lise Helen Ofstad (kanningarleiðari)

Gunn Hansen, Dan Askham, Durita Sørensen og Jens Arni Thomassen.

*Talva 1. Veiða, nytrur, magar, kruvd vekt, gonaduvekt, livurvekt og tal av støðum pr. fiskaslag.*

| Fiskaslag | Kg í alt | Nytrur | Magar | Kruvd vekt | Gonaduvekt | Livurvekt | Tal av støðum |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| SVARTKJAFTUR | 8544.166 | | | | | | 55 |
| HAVMÚS | 4243.907 | | | | | | 28 |
| TRANTKONGAFISKUR | 2792.077 | 131 | 20 | 18 | 27 | 28 | 34 |
| GULLLAKSUR | 2338.639 | 468 | 105 | 6 | 42 | 2 | 47 |
| HÝSA | 1783.920 | 30 | 8 | | | | 2 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 1602.631 | | | | | | 29 |
| SLÆTTHØVD | 1198.349 | | | | | | 17 |
| SKRUBBHÁVUR | 1168.925 | | | | | | 24 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 1094.344 | 49 | 13 | 14 | 3 | 3 | 17 |
| STINGLAKSUR | 1057.137 | 107 | 9 | 7 | 4 | | 16 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 831.971 | | | | | | 19 |
| SVARTHÁVUR | 795.866 | | | | | | 11 |
| BLÁLONGA | 700.250 | 208 | 62 | 101 | 52 | 35 | 44 |
| HÁKELLING | 600.000 | | | | | | 1 |
| GÓMAHOLSHÁVUR | 428.068 | | | | | | 15 |
| OPAL HAVMÚS | 405.796 | | | | | | 13 |
| TINDASKØTA | 314.034 | | | | | | 20 |
| SVARTKALVI | 247.818 | 90 | 52 | 11 | 41 | 15 | 12 |
| NEVHÁVUR | 239.244 | | | | | | 14 |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 221.232 | | | | | | 33 |
| BÚKSVARTI HÁVUR | 218.272 | | | | | | 18 |
| KUBBUTA LANGASPORL | 209.022 | 46 | 12 | 4 | 14 | 11 | 16 |
| MORA | 208.860 | 12 | 4 | | 6 | 7 | 17 |
| GLÍGGJHÁVUR | 187.665 | | | | | | 4 |
| HAVTASKA | 187.210 | 25 | 16 | 14 | 5 | 4 | 12 |
| HVALSPÝGGJ | 167.393 | | | | | | 34 |
| FJAÐURFAGRA HAVMÚS | 147.264 | | | | | | 12 |
| TOSKUR | 95.265 | 12 | 10 | 8 | 10 | 7 | 6 |
| BLÁRIDDARI | 87.477 | | | | | | 22 |
| LÁLLA | 83.184 | 5 | 5 | 5 | 4 | 5 | 17 |
| LONGA | 81.605 | 24 | 2 | 8 | 1 | | 3 |
| HALAHVASSA SKØTA | 80.415 | | | | | | 6 |
| TINDABAK | 68.087 | | 1 | 1 | 1 | 1 | 7 |
| BROSMA | 58.772 | 26 | 3 | 16 | | | 14 |
| BLÁGÓMUR | 58.265 | | | | | | 6 |
| LÍTLA BROSMA | 54.336 | 9 | 2 | | 2 | | 8 |
| KJAFTSVARTI HÁVUR | 39.490 | | | | | | 7 |
| SVARTBLETTUTA LANGASPORL | 35.560 | 1 | 1 | | 1 | | 7 |
| HVÍTASKØTA | 33.718 | | | | | | 5 |
| ÚLVFISKUR | 21.159 | 6 | 4 | | | | 14 |
| UPSI | 17.240 | 2 | | | 1 | | 3 |
| SILVURMURTUR | 16.969 | | | | | | 7 |
| FERBLETTUTA KVOYSA | 16.273 | | | | | | 2 |
| GLÝSUFISKUR | 16.087 | | | | | | 2 |
| LÝSINGUR | 15.855 | 10 | 2 | 7 | 2 | 2 | 3 |
| MJÁI PRIKKAFISKUR | 13.600 | | | | | | 21 |
| KLÆNASPORL | 12.425 | | | | | | 9 |
| NEBBASKØTA | 12.305 | | | | | | 3 |
| KIKARAFISKUR | 11.710 | | | | | | 7 |
| LIRI | 11.525 | | | | | | 2 |
| KLINGRUSKØTA | 9.550 | | | | | | 8 |
| SVARTFISKUR | 8.262 | | | | | | 7 |
| HVASSASPREK | 6.470 | | | | | | 4 |
| LÍTLIGLÁMUR | 5.731 | | | | | | 6 |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| RÍSNA LANGASPORL | 5.325 | | | | | | 1 |
| KALVI | 5.260 | 1 | 1 | | 1 | 1 | 1 |
| SÆVARANGI | 5.244 | | | | | | 10 |
| NASI | 4.690 | | | | | | 2 |
| REYÐKRABBI | 4.660 | | | | | | 2 |
| STORA LAKSATOBIS | 3.382 | | | | | | 5 |
| SMÁTINDABAK | 3.096 | | | | | | 4 |
| GUNTERS LANGASPORL | 3.046 | | | | | | 12 |
| TRANT LANGASPORL | 2.701 | | | | | | 6 |
| COLLETTS BÚKSVARTI HÁVUR | 1.790 | | | | | | 1 |
| TRÝNISÁLLUR | 1.399 | | | | | | 3 |
| SLOANS ORMFISKUR | 0.916 | | | | | | 8 |
| HEKSAKRABBI | 0.855 | | | | | | 1 |
| SMÁSKRUBBUTI GLÁMUR | 0.709 | | | | | | 1 |
| SPEGILSPRIKKAFISKUR | 0.632 | | | | | | 1 |
| JENSENSHAVUR | 0.470 | | | | | | 1 |
| REYÐA HORNABROSMA | 0.378 | | | | | | 1 |
| BLÁLAKSUR | 0.373 | | | | | | 3 |
| ÍSHAVS SÚGFISKUR | 0.324 | | | | | | 2 |
| SILD | 0.284 | | | | | | 1 |
| LANGASPORL | 0.239 | | | | | | 1 |
| KALDI ÚLVFISKUR | 0.238 | | | | | | 1 |
| MJÁIKJAFTUR | 0.228 | | | | | | 5 |
| PÍLFISKUR | 0.187 | | | | | | 1 |
| ENNIFISKUR | 0.167 | | | | | | 1 |
| LAKSATOBIS | 0.164 | | | | | | 1 |
| HUMMARI | 0.142 | | | | | | 1 |
| MACDONALDS PRIKKAFISKUR | 0.095 | | | | | | 1 |
| HULDUKRUTT | 0.076 | | | | | | 1 |
| BOA-DREKAFISKUR | 0.064 | | | | | | 1 |
| LAKSSILD | 0.044 | | | | | | 1 |
| GESTFISKUR | 0.034 | | | | | | 3 |
| VAHLS ULVFISKUR | 0.034 | | | | | | 1 |
| LÍTLI PRIKKAFISKUR | 0.03 | | | | | | 2 |
| GRØNLANDSGULLLAKSUR | 0.027 | | | | | | 1 |
| KRYTTLINGUR | 0.025 | | | | | | 1 |
| SEILUR | 0.024 | | | | | | 1 |
| GLÆMUFISKUR | 0.023 | | | | | | 1 |
| HAVNEBBASILD | 0.006 | | | | | | 1 |
| YMISK HØGGUSLOKKUR | 0.452 | | | | | | |
| YMISK RÆKJUR | 4.499 | | | | | | |
| YMIST(ostur, skrambul v.m) | 576.813 | | | | | | |
| Tilsamans | 33534.540 | 1262 | 332 | 220 | 217 | 121 | |